


## Umhugsa álop á Iran

Amerikanski verjuovastin, Mike Mullen, heldur, at eitt hernaðarligt álop á Iran hevði seinkað landsins kjarn-orkuverkætlan munandi. Hann leggur afturat, at tað er ikki hansara uppgáva at taka avgerð um eitt møguligt álop, men sjálvur heldur hann, at tað kann gerast tann seinasti møguleikin. Amerikanski verjumálaráðharrin, Robert Gates, hevur júst sent Barack Obama, forseta eitt notat við uppskotum um, hvørji stig USA eigur at taka í viðurskiftunum við Iran. Sambært New York Times mælir hann forsetanum til at endurskoða Iran-politikkin hjá stjórnini, soleiðis at eingin skal vera í iva um, hvør politikkurin er.

## Baugur skyldaði mest

Tá felagið Baugur Group skyldaði teimum stóru íslendsku bankunum mest, var skuldin oman fyri 5,7 milliardir evrur. Hetta var stutt fyri árslok í 2007. Tá svaraði upphæddin til 518 milliardir íslendskar krónur. Í dag svarar hon til næstan 1.000 milliardir, skrivar Morgunblaðið. Stutt fyri árslok í 2007 svaraði skuldin hjá Baugur Group og tess døttirfeløgum til 11 prosent av tí samlaða útláninum hjá trimum teimum størstu bankunum í Íslandi. Tá íslendska fíggjarkervið rapaði, skyldaði Baugur Group teimum trimum bankunum 4,5 milliardir evrur.

# Sjúklingar sleppa ikki av landinum til viðgerðar



**SJÚKRAFLUTNINGUR:** Fleiri føroyskir sjúklingar liggja og bíða eftir at sleppa uttanlands til serviðgerð, men fyribils hevur talan ikki verið um tilburðir, har tað hevur staðið um lív

Áki Bertholdsen

Flogbannið hevur eisini rakt sjúkraflutningin úr Føroyum til serviðgerð uttanlands, sera meint.

Allan Skaalum, stjóri á Landssjúkrahúsinum, sigur, at flogbannið fevnir eisini um hernaðarflúgving og ambulansuflúgving og tí hevur ikki borið til at fingið nakran sjúkling uttanlands í viðgerð síðani flogbannið varð sett í verk.

- Vit hava spurt okkum fyri og fingið at vita, at flogbann merkir flogbann, eisini fyri sjúkraflutning, sigur hann

Avleiðingin er, at nú liggja fleiri føroyskir sjúklingar og bíða eftir at sleppa uttanlands í viðgerð.

Hann vil ikki seta tal á, men hann leggur afturat, at hetta er ein øgiliga óheppin støða at vera í.

Men hann sigur, at talan er partvís um sjúklingar, sum skuldu til Danmarkar til ymsar viðgerðir, sum hevur verið ásett í eina tíð.

Hinvegin er talan eisini um sjúklingar, har tað hevur havt størri ella minni skund at sleppa av av landinum í viðgerð.

**» Hetta er ein øgiliga óheppin støða at vera í**

Talan hevur kortini ikki verið um tilburðir, har tað hevur staðið um lív, sigur Allan Skaalum.

### Fylgja væl við

Allan Skaalum sigur, at fyribils er onki at gera og Landssjúkráhúsið tekur hond um hesar sjúklingar so væl, sum tilber og higartil hevur tað gingið væl.

Onkrir sjúklingar eru kortini farnir til Danmarkar við Norrønu.

- Vit kanna støðuna alla tíðina og vísir tað seg, at flogið verður, kanna vit eftir, sum vit hava sjúklingar, sum kunnu fáa røttu viðgerðina, har sum flogið verður til.

Einstakar flogferðir hava verið til Íslands og Noregs, men vit høvdu ongan sjúkling, sum tað var relevant at senda hagar, sigur stjórin á Landssjúkrahúsinum.

Hinvegin eru tað so eisini nógvir sjúklingar, sum eru strandaðir uttanlands og ikki sleppa heim eftir lokna viðgerð, men samanumtikið er tað kanska ein minni trupulleiki, leggur hann afturat.

*aki@sosialurin.fo*

## Sluppu ikki til Danmarkar við sjúkum barni

**SJÚKRAFLUTNINGUR:** Flogbannið umfatar eisini sjúkraflutning

Tískil slapp Atlantsflog ikki til Danmarkar í morgun við einum sjúkum barni.

Tað upplýsir Sámal Danielsen, flogovasti hjá Atlantsflogi.

Hann sigur, at flogbann merkir flogbann, eisini fyri sjúkraflutning.

Sum Allan Skaalum sigur, liggja fleiri føroyskir sjúklingar og bíða eftir at sleppa uttanlands til serviðgerð.

Og í morgin komu tey í teirri støðu, at tey vildu hava eitt sjúkt barn til Danmarkar beinanvegin.

- Vit kannaðu málið hjá loftferðslumyndugleikunum, men vit fingu at vit, at vit fingu ikki loyvið at flyta sjúklingin til Danmarkar, tí flogbannið umfatar eisini sjúkraflutning, sigur Sámal Danielsen.

Sostatt bar ikki til at fáa undantaksloyvi til hendan sjúkraflutningin.